

Thor Alpha við bryggju í Singapore

# Føroysk frálandsskip á heimshøvunum

**Jan Müller**

09.03.2015 - 00:48

Oljan.fo

Tað er ikki hvønn dag, at skip bygd í Føroyum og undir føroyskum flaggi og við lutvíst føroyskari manning, leggja at í so fjarum havnum sum í Singapore. Men so langt røkkur virksemið hjá føroyska frálandsreiðaríinum, Thor. Tvey av teirra skipum arbeiða í Asia og tvey í Vesturafrika og onnur í Meðalhavinum og Norðureuropa.

Nú um dagarnar var Thor Alpha, eitt av frálandsskipunum hjá Thor at síggja við bryggju í Singapore. Hetta er tó ikki fyrstu ferð, at skipið, sum á sinni varð bygt á Skála, er í havn í hesum fjarskotna býnum í Asia.

Thor Alpha er í løtuni hjálparskip hjá seismikkskipinum Apollo, sum norska felagið PGS eigur. Tað hevur arbeitt saman við hesum skipinum nú í skjótt 3 ár.

Við Thor Alpha eru einir 4 føroyingar. Skipið hevur arbeitt har á leiðini seinastu 6 mánaðirnar.

